Minningarorð um Ingibjørg Hansen »Ingu« á Steig í Sandavági

Eingin veit á morgni at siga, hvar ein á kvøldi gistir, sigur orðataki, ið væl kann nýtast við deyðu ommu mína nú hon fyri góðum hálvum ári síðani legði árarnar inn.

Dagurin er 6. desembur 2001. Eg var til arbeiðis í Mjørkadali, tá mamma ringdi við ófrætta boðum, nú er omma farin. Tíðin steðgar, og tankarnir fara at sveima, omma kann ikki verða deyð, hon er bara 71 ár, hon kundi havt nógv góð ár eftir her á fold, men so bleiv ikki.

Omma var borin í heim 29. jan. 1930. Foreldur hennara sóu seg ikki før fyri at geva henni ein ríkan barndóm, tí bleiv hon fostrað upp hjá øðrum góðum fólki.

Eg ivist, um omma hevði givið mær loyvi til, at eg festi nøkur orð á blað um hana, tí onkuntíð tók hon til orðana. Hví rósa tey ikki fólki, tá ið tey eru á lívi, men bíða til deyðin hevur valdið. Vit hava sum siðvenju, at tá ið fyrr og núverandi løgtingsmenn doyggja, verða hesi menniskju róst til skýggja við minningarorðum søgd í útvarpinum, óansæð um persónurin hevur verið meira til skaða enn gagns. Fyri meg hevur omma mín havt størri týdning, enn nakar politikari nakrantíð kemur at hava. Eg havi kanska heldur ikki verði tann besti at róst andlit til andlit, tað er lættari sagt enn gjørt, men yvir fyri øðrum menniskjum hevur hon fingið nógv rósandi orð frá mær.

Sum 19 ára gomul giftist omma við abba mínum, Hans Eli, tey fingu 5 børn saman, og vaks eg upp saman við teimum sum elsta ommu/abba barni. Omma hevur verði nógv einsamøll saman við børnum sínum, abbi sigldi úti í stóru verð, var sjáldan heima, men tað var ein tryggleiki hjá okkum at vita, at hann gjørdi tað, so at vit ikki skuldu mangla nakað, hvørki til matna ella klædna. Míni fyrstu barna- og unglingaár var omma altíð heima við hús. Tað var sonn trygd at vita sær, tá ið ein skundaði sær heim av Giljanesi í døgurðatímanum, at døgurðin lá niðurskorin á tallerkinum hvønn einasta dag í árinum. Vit høvdu einans 1 tíma frí, til at ganga av Giljanesi heim á Steigina, fáa sær døgurðan niður um, og síðani somu leið afur inn á skúlan.

Vit høvdu fastar karmar at liva eftir. Tá ið komið var heim úr skúla fingu vit millummála, síðani vóru skúlatingini fingin frá hondini, og so kundi vit fara út at spæla. Heim aftur til fasta klokkutíð at eta nátturða, aftur út at spæla, og heim ikki ov seint, tí tíðliga skuldu vit til songar fyri at verða væl fyri dagin eftir. Onkuntíð var ein kanska keddur av at skula tíðliga í song um veðrið var av tí fagrasta, men soleiðis var tað, og haldi eg ikki, at vit eru verri farin av tí. Vit høvdu tryggleika og kærleika heima við hús, omma var altíð har, húsið var ongantíð tómt.

Tá ið yngsti sonurin var um 14 ára aldur, fór omma at arbeiða á flakavirkinum Snarfrost í Miðvági, hon arbeiddi sum reinskerari har, inntil hon gavst fyri aldur í 1997. Henni dámdi væl á Snarfrost, og at verða saman við øðrum, og veit eg við vissu at hennara arbeiði lá ikki eftir. Omma var plágað av ringari gigt í knounum, og vóru tað mong, ið ráddu henni til at søkja sær heilsubót, men henni dámdi ikki at fara undir læknahond, so heldur liva við pínuni. Knøini blivu verri og verri, so at hon tey síðstu árini sjálvdan fór uttandura, men sat í køkinum við kaffikoppi og sigarett.

Nú eg nevndi uttandura kann sigast, at omma hevur ikki slitið gáttina hjá nøkrum. Hon var heimamenniskja um ein háls. Fór bara heimaníframá, tá ið okkurt av ommubørnunum hevði føðingardag og tíliát. Men nógv eru tey, sum hava sitið væl inni hjá ommu, bæði kend og minni kend. Hon var altíð til dystin fús, tá ið ítróttarfólk og onnur skuldu húsast og hava mat. Á Vestanstevnu vistu fólk, at fóru tey norð í húsini við Myllánna, fóru tey ikki svong útaftur. Hon plagdi at hjálpa mær við at vaska SÍF-húsið, tey árini eg umsat húsið. Hon vaskaði ofta bóltklæðir hjá liðnum, tey árini eg spældi fótbólt. Tad ljóðar kanska ikki av so nógvum, men fyri meg hevði tað stóran týdning.

Omma var ógvuliga góð við bæði ommu- og langommubørn. Ommubørnini eru 13 í tali, og 7 eru langommubørnini. Tað tók fast hjá ommu og abba, tá ið eitt óndsinna menniskja gjørdi seg inn á eitt av ommubørninum í fjør, soleiðis at dóttur og húski rýmdi av landinum, tað kvetti ein stóran part av lívsviljanum hjá ommu, og var við til at skunda undir lagnu hennara. Mín vón skal verða, at tey óseku koma aftur til heimbygd mína við hevjaðum høvdi, soleiðis at rættvísi má sigra.

Tann gróðrarbotn hon legði niður í meg, vil eg eftir førimuni liva eftir. Omma livdi ikki til fánýtis, hon hevur skapt menniskju og stór virðir, sum eitt samfelag ikki kann vera fyri uttan.

Tá ið omma fór til gravar, var kirkjan so at siga full av fólki, og er tað enn eitt tekin um, at hon var avhildin av teimum, ið hon einaferð hevði havt samband við.

Góði abbi og onnur avvarðandi, omma er farin foldum frá, men minnini um hana kann ongin taka frá okkum.

Eg vil enda við teimum orðum sum omma altíð segði, tá ið eg fór út at spæla ella í skúla á morgni.

Jesur signi teg ella Jesus pápi verður hjá tær.

Takk fyri alt og hvíl í friði.

Eyðun

Ljómur konsert í Vágs kirkju

Mánakvøldið tann 24. juni kl. 20.00 hevur Kirkjukórið Ljómur summarkonsert í Vágs kirkju

KÓRKONSERT
Tíðindaskriv

Tað verða mest føroyskir sangir, ið verða á skránni.

Ljómur hevur hetta seinasta árið verið stjórnað av Hans Paula Tórgarð úr Tórshavn.

Hans Pauli hevur eisini havt barnakór í Vági hesa tíðina. Hann er komin suður hvønn mánadag at venja kórini, og hendan framførsl-an verður so tann seinasta á hesum sinni við Hans Paula.

Skráin verður soleiðis: Føroyar mín móðir, Ì sirmi, Dimmi, allir vælkendir sangir og verða nógv brúktir av føroyskum kórum.

Síðani kemur Morgunstund, Niels Petur Nolsøe týddi eftir Ingemann, Um tú vilt gleði vinna eftir Mikkjal av Ryggi við nýggja lagnum hjá Martin Restorff Jacobsen og Syngjandi fuglur (Poul F).

Tú gavst mær og Harri her livilig kor, og Sí, úr havi rísur nú morgunsól.

Eisini verður sangurin um tað føroyska málið – Eg fann teg í kvæðum – sungin, Chr. Matras yrkti, Regin Dahl lag og Knút Olsen hevur harmoniserað. Tveir týskir sangir: Abschied wom Walde og Wachet auf, ruft uns die Stimme. Til hendan seinna hevur Claus Telling orgulfylgispælið.

At enda verður tjóðsangurin við útseting fyri kór av Bjarna Restorff framførdur.

Bjarni gav í 1999 sjálvur hefti út við síni egnu útseting av tjóðsanginum. Útsetingarnar í hesum hefti kunnu brúkast hvør sær, mannskór, kvinnukór ella blandað kór.

Ì fororðinum í heftinum skrivar Bjarni m.a.:

– Tað er eingin ivi um, at tjóðsangurin er gjørdur á violin í fyrstu positión, og av tí sama er hann torførur at fáa at rigga. Tað er mín vón, at hesar útsetingar hava eitt sindur av tí hátíðardámi yvir sær, sum eg havi saknað í teim flestu útsetingunum – so hevur stríðið ikki verið til fánýtis.

Konsertin varðar umleið 1 tíma, sjálvsagt verður ein felagssálmur eisini. Hóast Jóansøkan er í nánd og øll hava nokk at takast við, vóna vit í Ljómi at nógv taka sær tíð og koma at njóta eina hugnaliga løtu í kirkjuni saman við okkum.

Norrønafelagið:

Nógvir pengar eftir til næmingar

Nógvir pengar eru framvegis eftir til føroyskar skúlanæmingar at ferðast fyri í Norðurlondum, minnir Norrønafelagið á í tíðindaskrivi

SKÚLAFERÐING
Norrønafelagið

Nógvir pengar eru framvegis eftir til føroyskar skúlanæmingar at ferðast fyri í Norðurlondum. Norrøna Felagið í Føroyum minnir á, at freistin at søkja um pengar í hesum umfarinum frá Nordplus Mini er til 1.juli 2002.

Nordplus Mini er fyri fólkaskúlanæmingar millum 13-17 ár. Til ber at fáa upp í 2.000,00 kr. fyri hvønn næming.

Umsóknarblað fæst frá Norrøna Felagnum, tlf. 217999. Umsóknin skal sendast til Foreningen Norden, Malmøgade 3, DK 2100 København Ø.

Faxnummarið er +45 35428088.

Annar møguleiki

Ein annar møguleiki at fáa pengar at ferðast fyri er at søkja frá Norrøna Felagnum. Felagið letur flokkum í fólkaskúlanum, 1. HF og 1. G og 2. G stuðul at ferðast fyri í Norðurlondum.

Høvuðstreytin fyri at fáa studning at ferðast fyri er, at skúlaflokkurin hevur samband við ein javnaldrandi skúlaflokk í onkrum øðrum Norðurlandi. Tann flokkurin skal so koma til Føroya. Næmingarnir skulu búgva hvør hjá øðrum. Við øðrum orðum skal skúlaflokkurin vera bæði gestur og vertur.

Fyri at søkja um hendan studningin krevst ikki serligt umsóknarblað. Vanligt bræv við frágreiðing um ætlaðu ferðina og kostnaðarætlan kann sendast til Norrøna Felagið í Føroyum, J.Paturssonargøtu 24, 100 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er til 1. november 2002.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

Martin Andreasen
í Havn

andaðist á Landssjúkrahúsinum
týsdagin 18. juni 2002, 77 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Frelsunarherinum leygardagin kl. 13.00.

Fyri tey avvarðandi
Dagmar

Sundalagið í stevnuhýri

Í kvøld, fríggjakvøld, byrjar Sundalagsstevnan so smátt við tombola, hoppiborg, rodeotarvi og dansi. Í ár verðar stevnan í Hósvík, har Bygdarfelagið og Róðrarfelagið hava fyrireikað og samskipað eina mongd av tiltøkum. Nú er restin upp til veðrið.

SUNDALAGSSTEVNA
Rúnar Reistrup

Alt er væl fyrireikað til eina so góða stevnu um gjørligt, nú Hósvík verður karmur um Sundalagsstevnuna. Men tað mest umráðandi fyri eina væleydnaða stevnu, veðrið, kann eingin fyrireika.

- Vit mugu bara vóna at veðrið verður gott. Tað hevur alt at siga fyri stevnuna, men verður tað regn, so er gott at vit hava tivoli undir skjóli í Bygdarhúsinum, sigur Høgni Lómstein, formaður í Bygdafelagnum í Hósvík. Hann er ein teirra, sum hevur staðið fyri fyrireikingararbeiðnum undan stevnuni.

Hóast tað ganga trý ár ímillum at Hósvík er stevnubygd, so missa fyrireikararnir ikki handalagið, og tá Jákup Pauli Joensen í morgin klokkan tvey setir stevnuna, skuldi alt verið væl fyrieikað.

Longu í kvøld letur tivoli upp í Bygdarhúsinum og í skúlagarðinum verður høvi at royna kreftir við hamartorni og rodeotarvi.

Út ímóti midnátt byrjar almennur dansur í bygdarhúsinum, har All That Rain spælir. Hósvíkingar vóna at fólk koma langvegis frá í dans og hava skipa fyri busskoyring úr Havn og Vestmanna í sambandi við dansin.

Turt

Leygardagin byrja ítróttarligu stevnutiltøkini. Grand Prix súkklukapping byrjar klokkan tólv, og sum vanligt er FM-kappróður á skránni klokkan trý. Seinni út á kvøldið verður stevnuteitið hjá sjónleikarbólkinum Spírar, frumframført. Á midnátt heldur Aref T. Olsen midnattarrøðuna, og tá er bólkurin Moon Shot longu farin í gongd við at spæla til dans í bygdarhúsinum.

Sunnumorgun verður guðstænasta við Ingu Poulsen Dam, presti. Seinni út á dagin er kappsigling og barnakonsert á skránni, og Føroya Ellisakfør seta gongd á motorarnar og trilla inn í Hósvik um trítíðina.

Men aftur til veðrið. Tað sigst at fara at vera hampuligt. Nakað av vindi, men yvirhøvur turt.

List úr Sundalagnum

Eitt av forvitnisligu tiltøkunum á Sundalagsstevnuni í Hósvík er ein listaframsýning við verkum hjá fimm listafólkum úr Sundalagnum.

SUNDALAGSSTEVNA
Rúnar Reistrup

Skúlin í Hósvík verður leygardagin og sunnudagin karmur um eina framsýning av umleið 80 listaverkum. Talan er um akvarellir, tekningar og oljumálningar hjá listafólkum úr Sundalagnum. Trý teirra eru úr Hósvík, eitt er úr Streymnesi og eitt er av Kjallnesi.

Adolf Johannesen úr Hósvík hevur tikið stig til stevnuframsýningina, sum er tann fyrsta av sínum slag í Hósvík.

- Tá stevnan hevur verið í Kollafirði og í Hvalvík hevur verið skipað fyri listaframsýningum og tað hevur eydnast væl, so vit vænta eisini nógv fólk til hesa framsýninginа sigur Adolf Johannesen. Hann hevur sjálvur verk við á framsýningini, sum harumframt telur verk hjá Gunnvá Mortensen, Idu Hansen úr Hósvík, Jóhannu Jacobsen av Kjallnesi og Odu Samuelsen úr Streymnesi.

Listaframsýningin letur upp leygardagin klokkan 17. Sunnudagin er framsýningin opin frá 15 til 20.